**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 27. januar 2016, kl. 19$^{00}$.**
**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

Hilbert Elisson møtti ikki.

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, eru tvey mál komin avtrat: annað málið er ein umsókn um umskipan uttangarðs og hitt málið er umsókn um stuðul til 8. mars hald. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málini á skránna sum ávikavist mál 158 og 159.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 157**
Áseting av Vestmannadøgunum 2016.
J.nr. 20.15.00-G01-1-16

**Viðv. 157**
Bygdarráðið samtykti, at Vestmannadagarnir 2016 vera í viku 25, sum er frá 20. – 24. juni 2016.

**Mál 158**
Umsókn frá Jonhard Mikkelsen um umskipan uttangarðs ímillum ogn hansara matr. nr. 131a og matr. nr. 341a hjá Finn Jørgin Olsen og matr. nr. 137b hjá Jóannis í Gerðinum, Regin í Gerðinum og Elisabeth í Gerðinum.

**Viðv. 158**
Pauli T. Petersen skeyt upp at taka undir at viðmæla umsóknini. Uppskotið hjá Paula T. Petersen var einmælt samtykt.

**Mál 159**
Umsókn frá Gyðju H. Didriksen og Augustu E. Petersen um stuðul til 8. mars-haldið 2016.
J.nr. 20.00.00-Ø40-4-13

**Viðv. 159**
Pauli T. Petersen skeyt upp at stuðla 8. mars haldinum við kr. 6.000.
Uppskotið hjá Paula T. Petersen var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Pauli T. Petersen | Karl A. Olsen | Herit Magnussen |
| Durita á Heygum | Malan Stórá | John Zachariassen |